# Oljudálkingin á Vágsfirði

**- Eg haldi, at Vágs Sløkkilið eftir umstøðunum kláraði uppgávuna væl, og teir vóru væl skipaðir undir arbeiðnum, heldur Pauli Einarsson, sum hevur felagið, OSR (Oil Spill Respons). Hann fýlist tó á, at Føroyar framvegis onga tilbúgvingarskipan hava á hesum øki**

DÁLKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leydagarkvøldið fór olja at leka úr einum russiskum skip, sum lá við bryggju í Vági. Í fyrstani sá lekin ógvusligur út, tí oljan breiddi seg skjótt, men tá ið saman um kom, halda kønir, at talan ikki hevur verið um tær heilt stóru nøgdirnar kortini.

Oljan, sum lak úr skipinum har frammi í stýriborð, rak serliga yvir á norðrara landið í Vági.

Vágs Sløkkilið fór alt fyri eitt undir at royna at steðga oljuni á Vágsfirði, men tað tók sína tíð, áðrenn tamarhald fekst á støðuni.

Nakað eftir middag sunnudagin, visti Portalurin at siga, at Vágs Sløkkilið framvegis ikki hevði fult tamarhald á støðuni, og boð vórðu send til Fiskiveiðieftirlitið, ið sendi tyrluna hjá Atlantsflogi avstað við absordentum, sum eru langar "pylsur" við behandlaðari bummull, ið sýgur oljuna til tín.



*Tað var úr hesum skipinum, at olja fór at leka leygarkvøldið. Við hjálp frá OSR og MRCC Tórshavn eydnaðist Vágs Sløkkiliði at fáa bilbukt við oljuni á Vágsfirði*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

Felagið, OSR (Oil Spill Respons) hjá Paula Einarssyni á Tvøroyri, kom eisini vágbingum til hjálpar, og sum leygardagurin gekk, fekst tamarhald á støðuni við teirri útgerð, sum vágbingar sjálvir høvdu, sum tyrlan kom við - og við útgerðini hjá OSR.

### Sá ógvusligt út

Pauli Einarsson sigur, at tá ið olja soleiðis lekur út á sjógv, sær hetta oftast ógvusligt út.

- Men eg trúgvi ikki, at talan kortini var um tær heilt stóru nøgdirnar av olju – og eg trúgvi neyvan, at talan var um fleiri tons.

Pauli vísir á, at verður "bert" ein oljutunna stoytt í havið, kann oljan í ringasta føri breiða seg yvir tveir ferkilometrar.

- Soleiðis, sum eg skilti støðuna í Vági við russiska skipinum, var talan um eitt hendiligt óhapp – og ikki um ósketni.

Hann sigur, at tveir menn frá OSR vóru í Vági leygarkvøldið og aftur sunnudagin og hjálpu Vágs Sløkkiliði við arbeiðnum.

- Eg haldi, at sløkkiliðsmenninir í Vági eftir umstøðunum kláraði uppgávuna væl, og teir vóru væl skipaðir undir arbeiðnum.

Á MRCC Tórshavn siga tey, at alt spældu væl av í Vági.

- Jú, hetta sá ógvusligt út, og vit skiltu, at eini 20 tons vóru í tanganum, sum olja lak úr.

Eingin veit tó við vissu at siga, hvussu nógv olja lak á sjógv í Vági leygarkvøldið og sunnunáttina, tí russar gjørdu tað, teir kundu, fyri at byrgja uppfyri dálkingini.

- Teir pumpaðu eisini olju úr skipinum, sum lak, upp í eitt annað russiskt skip, sum lá við síðuna av, segði Gudmund Jacobsen, sum er brandmeistari í Vági, við Útvarpið.

### Eingin tilbúgving

Tað kunnu neyvan vera fleiri meiningar um, at føroyingar eru alt ov illa fyrireikaðir, um ringast vildi til, og olja í stórum nøgdum fór í havið - antin av ósketni ella í einum hendiligum óhappi.

- Nógv hugskot hava verið frammi um, hvussu ein veruligt tilbúgving eigur at skipast, og arbeitt hevur verið við hesum í fleiri ár, men vit mugu ásanna, at vit sum samfelag enn ikki eru komin undir land við eini forsvarligari loysn, sigur Pauli Einarsson.

### Dálkarin rindar fyri upptøkuna

Løgreglan á Tvøroyri varð boðsend, tá ið vágbingar leygarkvøldið staðfestu, at oljan var likin á sjógv.

- Vit høvdu fólk á staðnum og staðfestu, hvaðani oljan kom. Síðan tryggjaðu vit okkum, at partarnir, sum skulu kunnast um støðuna í slíkum føri, høvdu fingið fráboðanina. Ein frágreiðing verður skrivað, og síðan er tað upp til fútaskrivstovuna, hvussu málið annars verður avgreitt.

Jaspur Vang, løgreglumaður, sigur, at honum kunnugt er tað dálkarin, sum í slíkum føri rindar fyri uppruddingina.

Um talan er um ósketni ella hendiligt óhapp, heldur Jaspur ikki hevur týdning fyri, hvør rindar fyri ruddingararbeiðið.

- Hendingin í Vági verður latin fútaskrivstovuni, sum síðan tekur støðu til, hvat meira – um um nakað meira – hendir í hesum máli, sigur Jaspur Vang, løgreglumaður.

## Sligin og bardur

HARÐSKAPUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnumorgunin fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein ungur maður, sum var á Sundalagsstevnu í Hósvík sunnunáttina, hevði fingið eina fløsku í høvdið.

- Tað var ungi maðurin sjálvur, sum boðaði okkum frá hendingini, sigur løgreglan.

Men tá ið løgreglan kom á staðið, vísti tað seg, at hendingin var nógv meira umfatandi, enn maðurin hevði sagt.

- Vit tosaðu við fleiri vitnir í Hósvík sum søgdu, at maðurin, sum framdi harðskapin, í fyrsta lagi hevði sligið hin einar 8-10 ferðir í andlitið, meðan hann helt honum í høvdið. Síðan datt maðurin – og aftan á tað, varð tann álopni bæði sligin, sparkaður og trampaður, bæði í høvdið og kroppin.

Løgreglan sigur, at teir tóku mannin, sum hevði framt harðskapin, við sær á støðina, har hann varð avhoyrdur.

Vakthavandi á løgreglustøðini, sum vit tosaðu við mánadagin, visti ikki at siga, hvussu hesir báðir ungu menninir vóru komu til ilnar í Hósvík, men alt bendir á, at tann eini maðurin hevur verið so harðligur við hin, at talan er um eitt harðskapsmál.

Mánadagin visti vakthavandi ikki at siga, hvussu maðurin, sum var fyri harðskapinum, hevur tað.

# Tónleikur, fiskasuppa og søga í Bátasavninum

HUGNALØTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri var hugnaløta á Bátasavninum í Leirvík, har sveisisku systrarnar, Monika Stauss Joensen og Andrea Stauss Hofmann spældu á violin og klaver. Tær báðar byrjaðu at spæla saman sum heilt ungar, og hóast Monika er gift til Leirvíkar og í fleiri ár hevur búð í Føroyum, hava tær báðar luttikið saman í nógvum tiltøkum í heimlandinum. Soleiðis fara tær eisini at spæla í Sveits í summar, tá ið Monika fer heimaftur at vitja.

Tiltakið í Bátasavninum í Leirvík var sera væl eydnað, og yndisligi tónleikurin hjá systrunum báðum, sum eru ógvuliga væl samanspældar, setti sín serstaka dám á kvøldið, sum eisini var kryddrað við øðrum áhugaverdum. Listarliga var tónleikurin á einum høgum altjóða støði, og tær spældu løg, sum fevndu heilt frá konserttónleiki til sigoynaratónleik.

Tá ið Monika og Andrea høvdu spælt tað mesta av einum tíma og soleiðis høvdu fingið "hita" í tey 90-100 fólkini, sum vóru komin til tiltakið, var tónlistarligi parturin mest sum liðugur.

### Fiskavørur

Jógvan Høj, stjóri á Norðfra, greiddi síðan frá, hvussu virkið í Norðdepli roynir at byggja upp ein heimamarknað - og hvussu stórur hesin marknaður í veruleikanum er.

Ein av vørunum hjá Norðfra, sum rættiliga hevur "fangað" millum føroyingar, er kenda og sera væl smakkandi fiskasuppan, har hýsa er grundarlagið saman við eitt nú eplum og gulaarótum. Henda suppa er vælegnað til nútímans føroysku familjurnar, sum eru nógv úti, tí hon er liðugtgjørd eftir einum korteri.

Vøruúrvalið, sum Jógvan og Norðfra bjóða heimamarknaðinum, er rættiliga stórt, og prísirnir eru avgjørt kappingarførir – ikki minst tí, at Norðfra eisini selir beinleiðis til brúkararnar.

Tá ið Monika og Andrea høvdu spælt tað mesta av einum tíma, og Jógvan hevði greitt frá vøruútboðnum hjá Norðfra, vóru fólk vorðin svong. Tí kom tað væl við, at virkið í Norðdepli eisini hevði sett upp eina bufét við ymiskum fiskaúrdráttum – og sjálvsagt eisini suppuni, sum rættiliga fekk bein at ganga á hetta kvøldið.

Eftir at fólk høvdu fingið sær ein bita – og høvdu skolað niður við fiskasuppuni, spældu Monika og Andrea aftur eitt lítið tónleikastykki.

### Turkihúsið

Síðan hevði Jóannes Eliasen orðið, har hann greiddi frá søguni aftanfyri turkihúsið í Leirvík, sum nú er karmur um snotuliga Bátasavnið hjá Ossa.

Tað vóru nevniliga Klæmint Eliasen, pápi Jóannes og Elias Eliasen, sum í sínari tíð bygdu turkihúsið.

Jóannes dugdi sera væl at greiða frá, hvussu turkihúsið varð bygt upp, og hvussu nógvur fiskur varð virkaður í húsinum í Leirvík og í turkihúsum kring landið annars.

Hann lýst pápan á ein áhugaverdan og livandi hátt – sum ein mann, ið var høgt í metum í bygdini, ein sparin og myndugur maður, sum vendi hvørji krónu.

Jóannes greiddi eisini frá, hvussu tey, ið ikki vóru best fyri í bygdini, líkasum fingu ein framíhjárætt at arbeiða í turkihúsinum – og tá ið nøkur høvdu arbeitt í eina tíð, sluppu onnur framat.

Klæmint legði soleiðis stóran dent á tað sosiala í bygdini.

Jóannes greiddi eisini sera hegnisliga frá ymiskum fólkum, sum høvdu arbeitt á virkinum.

Umframt at lýsa ta gomlu tíðina við turkihúsum, sum skaptu ein stóran aktivitet í bygdunum kring landið, dróg Jóannes eisini "parallellir" til dagin í dag, nú rávøra í stórum nøgdum fer av landinum, samstundis sum eingin lyftir hond frá síðu til at byrgja upp fyri hesum.

### Bátasavnið

Tiltakið í Bátasavninum í Leirvík var fjølbroytt og sera væl eydnað. Tú fekst at vita um søguna, sum liggur aftanfyri tað samfelag, vit hava í dag – á ein lættan og áhugaverdan hátt, tú fekst høvi at royna nýggjastu fiskavørurnar á føroyska heimamarknaðinum, og ikki minst varð løtan "kryddað" við ynsidligum violin-og klavertónleiki hjá sveisisku systrunum, Moniku og Andreu.

Tey, sum komin vóru til hugnaløtuna í Leirvík hetta kvøldið, fóru ríkari – og mettari – heimaftur, og sigast má, at Bátasavnið í Leirvík er ein fantastiskur karmur til slík tiltøk sum hetta.